J.nr.: F.K. 00-04-
Dato: 26. januar 2006
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglakomm.fo
Heimasíða: www.fuglakomm.fo

# FUNDARFRÁSØGN

**frá býráðsfundi nr. 01/2006**

Ár 2006 tann 26. januar kl. 16.30varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 20. januar 2006 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Petur Abrahamsen
Jón Nolsøe Olsen er burturstaddur uttanlands

Skrivari: Jákup Frants Larsen

**Mál nr. 01/2006. (J.nr. F.K. 00-02-087).**

**Viðvíkjandi vali av føstu kommunalu nevndunum sambært kommunustýrislógina og kommunustýrisskipanina fyri Fuglafjarðar kommunu.**

Vísandi til at avtalu sum gjørd er millum allar býráðslimir um at velja allar tær 5 føstu nevndir býráðsins av nýggjum, so verður skotið upp sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 19. januar 2006, at nevndirnar verða mannaðar soleiðis eftir býráðsfundin tann 26. januar 2006 valskeiðið út, t.v.s. fram til 31. desember 2008:

**Fíggjarnevndin:**
- Sigurð S. Simonsen
- Eyðun á Lakjuni
- Elisabeth D. Eldevig

**Tekniska nevndin:**
- Jón Nolsøe Olsen
- Petur Abrahamsen
- Jann Toftegaard

**Havnanevndin:**
- Signar á Brúnni
- Tórfríður Abrahamsen
- Dánjal Vang

**Mentamálanevndin:**

- Dánjal Vang
- Jann Toftegaard
- Signar á Brúnni

**Sosiala nevndin:**

- Eyðun á Lakjuni
- Dánjal Vang
- Elisabeth D. Eldevig

Sambært avtaluni verður formansskapurin í teimum 4 niðanfyristandandi nevndum hesin:

**Tekniska nevndin:**

- Jón Nolsøe Olsen, formaður
- Petur Abrahamsen, næstformaður
- Jann Toftegaard, nevndarlimur

**Havnanevndin:**

- Signar á Brúnni, formaður
- Tórfríður Abrahamsen, næstformaður
- Dánjal Vang, nevndarlimur

**Mentamálanevndin:**

- Dánjal Vang, formaður
- Jann Toftegaard, næstformaður
- Signar á Brúnni, nevndarlimur

**Sosiala nevndin:**

- Eyðun á Lakjuni, formaður
- Dánjal Vang, næstformaður
- Elisabeth D. Eldevig, nevndarlimur

Borgarstjórin er føddur formaður í fíggjarnevndini, meðan varaborgarstjórin tekur sæti sum formaður í nevndini, um borgarstjórin hevur forfall.

Annars skulu nevndirnar sjálvar skipa seg eftir valið við formanni og næstformanni, meðan ávís starvsfólk eru fastir skrivarar hjá nevndunum. Í sambandi við skipan verður víst til § 28, stk. 1, tó smbr. § 38, stk. 1, pkt. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við gildiakomu tann 1. januar 2001, broytt við L.L. nr. 71 frá 6. mei 2003.

Víst verður annars til notat frá býráðsskrivaranum, dagfest 15. desember 2005 um mannagongdir í sambandi við vali av nevndum smbr. § 28, stk. 4 í kommunustýrislógini.

**Avgerð:**

Samtykt varð at velja nevndirnar av nýggjum sambært avtaluni, sum gjørd er tann 11. januar 2006. (8-0).

**Mál nr. 02/2006. (J.nr. F.K. 00-11-088).**

**Mál viðv. roknskapinum hjá Fuglafjarðar bókasavni fyri 2005.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, dagfest 17. januar 2006 saman við grannskoðaðum roknskapi og grannskoðarafrágreiðing fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2005.

Roknskapurin vísir, at samlaðu útreiðslurnar hava verið **kr. 580.095,02** móti mettum kr. 586.950,00. Sostatt eru kr. 6.854,98 minni nýttar enn mett. Lønirnar hava verið kr. 7.540,71 hægri enn mett, húsaútreiðslurnar kr. 7.990,61 lægri enn mett, bókakeyp og innbinding kr. 27.170,20 hægri enn mett, aðrar útreiðslur kr. 33.780,20 lægri enn mett.

Inntøkurnar hava verið kr. 458.529,54 móti mettum kr. 586.950,00 ella kr. 128.420,46 minni enn mett, og skyldast hetta fyri størsta partin, at landskassastuðulin upp á 60% bert hevur verið kr. 256.528,76 móti mettum kr. 327.600,00 ella kr. 78.305,480 minni enn mett, svarandi til sløk 44%.

Sostatt samsvarar býtið millum landskassastuðulin og kommunustuðulin ikki samb. Bókasavnslógina § 14, har landskassastuðulin kann verða 60% av góðkendari rakstraræltan, og kommunustuðulin 40%. Býtið fyri 2005 sær tessvegfna soleiðis út, at kommunustuðulin hevur verið 56%, meðan landskassastuðulin hevur verið 44%.

Rentuútreiðslurnar hava verið kr. 354,92, og er eingin avseting tikin við av rentum og avskrivingum í ætlanini fyri 2004.

Staðfest er eitt hall av rakstri upp á kr. 121.565,48, sum leggjast skal aftrat kommunustuðlinum upp á kr. 200.000,00, so hevur samlaður hevur verið kr. 321.565,48.

Haraftrat skal verða upplýst, at bókavørðurin frá 01. januar 2003 at rokna sambært munnligari avtalu millum Landsbókavørðin og mentamálanevndina hevur arbeitt partvíst við bókasavnsarbeiði á Miðnámsskúlunum á Kambsdali, og at kommunan hevur fingið endurgjald fyri hetta arbeiðið.

Málið hevur verið til viðgerar á fundi í mentamálanevndini tann 19. januar 2006, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2005 uttan viðmerkingar.

**Avgerð:**

Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.00.

Jann Toftegaard

Dánjal Vang

Signar á Brúnni

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Tórfríður Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen